Tórshavn 15 mai 2008

**Viðvíkjandi løgtingsmál nr. 148/2007 (Roykilógin)**

Vegna Smyril Line loyva vit okkum at koma við hesum viðmerkingum til omanfyrinevnda løgtingsmál.

Sum kunnugt eiga og reka vit ferðamannaskipið Norrønu sum er skrásett í Føroysku Altjóða Skipaskrásetingini (FAS).

Umborð á Norrønu fer tubbakssøla fram í dag, sum ið einum sjálvtøku handli. Hetta uppskoti forbjóðar sølu av tubbaksvørum í handlum, samstundis sum at vøran ikki má liggja frammi, tí hetta er at tulkast sum ein lýsing av vørunum.

Vit hava lagt til merkis, at loftferðslan til Føroyar ikki verður nervað av hesari lóg, ímeðan ongi undantøk eru gjørd fyri sjóferðsluna. Um uppskotið verður samtykt í verandi líki, so vil tað føra við sær, at tað ikki er møguligt hjá Smyril Line at selja tubbaksvørur umborð á Norrønu. Og tí meta vit uppskotið; sum kappingaravleiðandi fyri Smyril Line mótvegis loftferðsluni.

Norrøna er í altjóða millumlanda sigling, og er tískil í harðari kapping við onnur reiðaríir, ið hava betur sømdir givnar frá teimum flagstatum, ið hesi skip eru skrásett.

Reiðaríir, ið Smyril Line eru í kapping við, hava ikki tílíkar ásetingar, tískil meta vit, at lógin sum nú fyriliggur, er ógvuliga kappingar avleiðandi fyri Smyril Line mótvegis okkara kappingarneytum.

Vit selja eisini rúsdrekka. Og vit skeinkja eisini rúsdrekka á okkara matastøðum umborð. Tó so at hetta kann bert gerast í millumlandasigling og uttanfyri 3 fjóðringar. Tubbakssølan fer heldur ikki fram fyri enn vit eru uttan fyri 3 fjóðringar.

Vert er at nevna, at øll londini rundan um okkum hava antin tax free ella duty paid sølu á flogvøllum og umborð á skipum, og hetta er at meta sum sjálvtøku handlar. Her er tó undantikið umborð á sjálvum flogfarinum.

Vert er at býta merki í, at har eru ikki kappingaravleiðandi tiltøk sett í verk hvørki fyri flogvallir ella reiðarír. Hetta hóast at tiltøk eru sett í verk á heimamarknaðinum.

J. BRONCKS GØTA 37 · P.O. BOX 370 · FO-110 TÓRSHAVN · THE FAROE ISLANDS · TEL +298 34 59 00
FAX +298 34 59 50 · OFFICE@SMYRIL-LINE.FO · WWW.SMYRIL-LINE.COM

Hetta er heldur ikki í samsvar við tær útsøgnir, ið eru komnar frá løgtinginum, um at gera FAS skipaskrásetingina meira kappingarføra. Hetta hevur í øllum førum við sær, at tað ikki gerst meira tekkjuligt at lata skip skráseta seg í FAS.

Vit vóna, at Føroya Løgting tekur hædd fyri omanfyrinevndu viðmerkingum í síni viðgerð av uppskotinum.

Vit vilja eisini nevna, at Smyril Line tekur undir við andanum í lógaruppskotinum, sum er at skapa eitt roykfrítt umhvørvi fyri almenningin.

Vegna Smyril Line

Jákup Sverri Kass

Rói Kalsø

J. BRONCKS GØTA 37 · P.O. BOX 370 · FO-110 TÓRSHAVN · THE FAROE ISLANDS · TEL +298 34 59 00
FAX +298 34 59 50 · OFFICE@SMYRIL-LINE.FO · WWW.SMYRIL-LINE.COM